UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:
## Stórt fall

Árið í fjør royndist illa hjá teimum 30 fyritøkunum, hvørs partabrøv vórðu tey mest seldu og keyptu á partabrævamarknaðinum í Stockholm.

Eitt yvirlit vísir, at meðan fyritøkurnar høvdu 311 mia. krónur í avlopi í 2000, var avlopið bara 156 mia. krónur í fjør ella bara helvtin. Fyritøkurnar Ericsson og ABB átttu helvtina av fallinum.

Yvirlitið vísir, at Telekom-marknaðurin varð meinast raktur av búskaparafturgongdini í fjør. Nevnast kann, at Ericsson, Nokia og Telia høvdu 94 mia. krónur í vinningi í 2000, men í fjør var avlopið bara átta mia. króinur. Serliga úrslitið hjá Ericsson var vánaligt - frá 30 mia. krónum í vinningi í 2000 til næstan 30 mia. krónur í halli í fjør.

## IMF-krøv

Stjórnin í Turkalandi hevur gjørt av at slaka fyri krøvum frá Altjóða Gjaldoyragrunninum IMF. Landið fekk í veruleikanum knívin á barkan og hevur nú givið IMF lyfti um at betra ta almennu umsitingina og at steðga korrupsjónini.

Stjórnin í Ankara sigur, at hon fer at siga 50.000 almenn starvsfólk úr starvi í ár, og at onnur 25.000 verða uppsøgd næsta ár. Samstundis hevur hon bundið seg til at leggja fram eina fíggjarlóg fyri 2003, sum skal hava 6,5 prosent í avlopi. Peningin ætlar stjórnin at fáa burtur úr hægri avgjøldum á bensini og gassi, samstundis sum ognarskatturin skal hækkast. Eisini hevur stjórnin bundið seg til at basa inflasjónini, sum í løtuni liggur um 90 prosent. IMF krevur, at hon skal niður á 12 prosent innan trý ár.

Turkiska stjórnin væntar, at landsins bruttotjóðarframleiðsla fer at hækka trý prosent í ár og kanska meiri, men óheftir búskaparfrøðingar ivast í metingini.

# Tær tora ikki heimaftur



*Nógvar afghanskar kvinnur, sum eru í flóttalegunum í Pakistan og Iran, tora ikki heimaftur. Søgurnar ræða*

**Nógv afghansk flóttafólk, sum eru í flóttafólkalegum, tora ikki at fara heimaftur, siga mannarættindafelagsskapir. Serliga kvinnurnar stúra**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*

Tað eru framvegis millum tríggjar og fýra milliónir afghansk flóttafólk í legum í Pakistan og Iran. Tey flestu hava sera vánalig kor í legunum, og hóast pakistansku og iransku myndugleikarnir gera sítt ítartsta fyri at fáa tey at fara heimaftur, tora tey ikki.

- Eg tori ikki at fara heimaftur, sigur ein av kvinnunum. Hon er av hasara-fólkinum í landspartinum Baghlan norðan fyri høvuðsstaðin Kabul. Hon sigur seg hava frætt, at nógvir hasarar og usbekar vórðu myrdir í Baghlan tíðliga í november. Bara tann eina dagin doyðu tólv, sigur hon og leggur afturat, at tey hava frætt tíðindini frá einum manni, sum var so heppin at sleppa burtur haðani.

Ein onnur kvinna sigur, at hon torir ikki at fara heimaftur, tí hon er bangin fyri, at krígsharrarnir, sum tóku valdið aftan á tey amerikansku bumbuálopini, fara at hevna seg. Sjálv er hon av pasjtuna-fólkinum, men er ættað úr einari bygd, har tey flestu eru usbekar.

Kvinnurnar og fleiri av hinum flóttafólkunum bera eisini ótta fyri at verða álopin á veg heimaftur. Tey hava frætt, at krígsharrarnir og brotsmannalið hava sett vegbyrgingar upp ymsastaðni millum teir stóru býirnar. Har krevja teir at fáa pengar aftur fyri at loyva flóttafólkunum framvið. Tey, sum ikki hava pengar, verða skotin. Ein lastbilaførari varð herfyri særdur av skotum, tá hann sýtti fyri at steðga við eina av hesum vegbyrgingunum.

### Krígsharrar ráða

Mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch sigur, at flóttafólkini kenna seg heldur ikki trygg í legunum í Pakistan og Iran. Felagsskapurin sigur, at nógv fólk eru illa viðfarin, og summi eru vorðin noydd yvir um afghanska markið ímóti sínum vilja.

Nógvar av kvinnunum í legunum kenna seg ótryggar, tí tær hava frætt, at ókendir menn hava verið í legunum, har teir hava burturflutt ungar gentur. Sjálvar bera tær eisini ótta fyri kynsligari misnýtslu, velja tær at fara heimaftur.

ST-flóttafólkastovnurin UNHCR fer tann 1. mars undir eina verkætlan, sum skal fáa umleið 800.000 flóttafólk at venda heimaftur, men Human Rights Watch stúrir fyri, at fleiri verða noydd at fara heim ímóti sínum vilja. Tað avsannar ST, sum sigur, at ætlanin er at hjálpa teimum, sum vilja sleppa heimaftur.

Alment er tað fyribilsstjórnin í Kabul, sum stýrir Afghanistan í dag, men í fleiri landspørtum eru tað krígsharrar av ymiskum slagi, sum hava tað veruliga valdið. Har vesturi og har norðuri í landinum er støðan so ótrygg, at sjálvt ikki neyðhjálparfelagsskapirnir tora hagar at hjálpa teimum neyðstøddu.

# Tað vóru ikki arabarar

**Ein stórur meiriluti av heimsins muslimum halda ikki, at tað vóru arabarar, sum skipaðu fyri yvirgangsatsóknunum í USA tann 11. september í fjør**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Hetta sæst í einari kanning, sum amerikanski Gallupstovnurin hevur gjørt í arabiskum og muslimskum londum. Hóast fjølmiðlar um allan heim óteljandi ferðir hava sagt og skrivað, at 15 av teimum 19 flogrænarunum vóru saudiarabarar, halda bara 18 prosent av teimum spurdu muslimunum, at tað vóru arabarar, sum skipaðu fyri atsóknunum.

Blaðið USA Today skrivar, at nógv av teimum spurdu geva Ísrael og USA sjálvum skyldina av tí, sum hendi.

Gallup hevur spurt 9.924 fólk í teimum níggju londunum Saudiarabia, Iran, Pakistan, Indonesia, Turkalandi, Libanon, Kuwait, Jordan og Marokko. Umleið helmingurin av heimsins muslimum búgva í hesum londunum.

Tey vórðu eisini spurd, hvat tey hildu um amerikansku krígsførsluna í Afghanistan. Níggju prosent svaraðu, USA hevði rætt til at fara í kríggj ímóti Taliban og al-Qaeda, men 77 prosent hildu, at amerikanska avgerðin var skeiv.

Úr Norðurlondum:
## Skilja kirkju og stat

Meiriluti er í norska Stórtinginum fyri at skilja norsku kirkjuna frá statinum, men avgerðin kann tó ikki setast í verk fyrr enn eftir næsta val. Summir politikarar halda kortini, at fólkið eigur at sleppa at siga sína hugsan, og tí er ikki óhugandi, at spurningurin verður lagdur til vegleiðandi fólkaatkvøðu fyrst.

Nógvir politikarar eru kortini varnir, og minni enn so allir halda, at tað er rætt at gera fullan skilnað millum kirkjuna og statin. Summir stórtingslimir halda, at tað átti at borið til at funnið eina skipan, sum ger kirkjuna meiri sjálvsstøðuga.

## Illveður

Rættiliga nógvur vindur var í syðra parti av Danmark týskvøldið og mikunáttina. Veðurmenninir høvdu boðað frá stormi og ódn í hvirlunum, og onkunstaðni máldu teir upp í 42 metrar um sekundið.

Bjargingartænastan Falck fekk fráboðanir um einar 200 skaðar og hús og bilar, teir flestu í Suðurjútlandi, Lollandi og á Falster. Nógv trø fóru í vindinum, og onkunstaðni kvettu trøini el-veitingina. Ferðslan var eisini nógv darvað av vindinum, tí myndugleikarnir valdu at steingja fleiri brýr, teirra millum brúnna um Stórabelti.

## Størri hjálp

Teir stóru hjálparfelagsskapirnir í Noregi vilja hava politikararnar at lata meiri pengar í menningarhálp.

Í einari felags áheitan heita Flykningerådet, Kirkens Nødhjelp, Norges Røde Kors, Norsk Folkehjelp og Redd Barna á Stórtingið um at økja menningarhjálpina, sum hon verður eitt prosent av norsku bruttutjóðarframleiðsluni. Tað hevði havt við sær, at tann árligi stuðulin hevði vaksið umleið hálva aðru mia. krónur.

Í ár eru 50 ár, síðani norski staturin veitti ta fyrstu menningarhjálpina.

# ítróttur

Nr. 41 • hósdagur • 28. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Fleiri avlýsingar

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Týskvøldið vóru tveir hondbóltsdystir í 1. deild hjá monnum og kvinnum avlýstir. Bæði mans- og kvinnuliðið hjá Kyndli skuldu inn á Skála at spæla ímóti StÍF, men vegna veður vórðu hesir dystirnir avlýstir, og ikki er greitt enn, nær teir verða spældir.

Dysturin millum kvinnuliðini hjá StÍF og Kyndli var annars sera avgerandi fyri botnstríðið, tí bæði liðini stríddust fyri at varðveita sessin í bestu deildini. Kyndil skuldi vinna fyri at yvirliva, meðan StÍF kundi liva við einum javnleiki.

Í kvøld, hóskvøldið, verður dystur í gundadalshøllini millum kvinnuliðini hjá Neistanum og Sóljuni. Hetta er ein útsettur dystur, sum skuldi vera mikukvøldið.

# Tipspengar til Føroya uttan sáttmála

**Fríggjadagin rennur sáttmálin millum partafelagið Ítróttarvedding og donsku Tipstænastuna út. Hóast eingin sáttmáli er, verða tipspengarnir, sum eru 6,5 milliónir um árið, framvegis sendir til Føroya. Ein lóg í Fólkatinginum skal broytast, áðrenn henda veitingin verður steðgað**

TIPSPENGAR
*Stefan í Skorini*



*Heðin Mortensen fer at gera alt, hann er mentur, so føroyski parturin av tipspengunum ikki verður skerdur ella fellur burtur*

Danska Tipstænastan vil ikki leingja sáttmálan við smápartafelagið Ítróttarvedding við meira enn einum ári. Hetta heldur Heðin Mortensen, stjóri í partafelagnum, vera alt ov lítið, tí felagið hevði skotið upp at leingja sáttmálan við fýra árum.

Orsøkin til at Tipstænastan ikki vil leingja sáttálan við meira enn einum ár er, at landsstýrið arbeiðir við at savna V4, Gekkin og Happadráttin í eitt landsumfatandi spæl við størri vinningum, enn tey geva nú.

Tipstænastan vil vita, hvat fer at henda á hesum økinum, áðrenn sáttmálin verður longdur.

Hóast eingin sáttmáli enn er undirskrivaður millum Ítróttarvedding og Tipstænastuna, er tann føroyski parturin av tipspengunum tryggjaður við lóg í Fólkatinginum. Tí skal henda lógin broytast, áðrenn føroyingar missa sínar 6,5 milliónir um árið, sum Tipstænatan sendir til Føroya.

Tað vil siga, at hóast sáttmálin ikki verður longdur, verða pengarnir framvegis sendir til Føroya, uttan so at lógin í Fólkatinginum verður broytt. Føroyingar fáa tipspengar, hóast tað ikki er heilt lógligt at spæla lotto og at tippa í Føroyum.

### Vanlukkuligur standur

Heðin Mortensen, stjóri í Ítróttarvedding og forseti í ÍSF, heldur, at tað hevði verið ein vanlukka, um føroyingar missa tipspengarnar. Tí ger hann alt, hann er mentur, fyri at tryggja, at Føroyar framhaldandi fáa part av tipspengunum.

Hann greiðir frá, at Ítróttarvedding fyrst bjóðaði Tipstænastuni ein tvey ára sáttmála, men at hon heldur vildi hava ein sáttmála á fýra ár. Nú hava danir kúvent í málinum og vilja bara leingja sáttmálan við einum ári.

Heðin Mortensen sigur, at hann hevur havt samband við Tipstænastuna og hevur greitt teimum frá, at teirra tænasta í Føroyum ikki verður ávirkað av ætlanum landsstýrisins, men at virksemi teirra kann halda fram sum áður.

Væntandi fær felagið Ítróttarvedding, ið hevur einkarætt til slík spøl í Føroyum, svar úr Danmark skjótt.

Ein stórur partur av peninginum frá Tipstænastuni fer til ítróttin og til landsliðsarbeiði. Um Føroya ikki hevði tipspengingin hevði neyvan nakað landslið verið í hondbólti.

– Tað hevði verið ein katastrofa, um vit missa tipspengarnar, tí vit hava einki at seta ístaðin, sigur Heðin Mortensen.

### Fáa meira enn vit lata

Føroyingar spæla fyri einar 15-16 milliónir krónur árliga. Einar 7-8 milliónir krónur koma aftur í føroyskar lummar í vinningi. Í donsku lógini stendur, at Føroyar fáa 0,5% av yvirskotinum hjá Tipstænastuni, og hetta er 6,5 milliónir krónur. 60% av hesum fara til ÍSF, 20% til FUR og 20% til Mentamálastýrið, ið býtir peningin út til ungdómstiltøk.

Harafturat fáa kioskirnar, ið hava tips og lott, ein part av umsetninginum og Føroya Tele fær pening fyri at umsita netið. Tilsamans koma fleiri pengar til landið, enn vit lata av landinum.

Heðin Mortensen hevur heitt á løgmann, ið er verji hjá ítróttinum í Føroyum, um at seta seg í samband við danska mentamálaráðharran og forsætisráðharran og biðja um, at føroyski parturin ikki verður minkaður.

Hann heldur ikki, at tað ber til at minka um tann føroyska partin, bara tí at landsstýrið arbeiðir við at seta eitt nýtt spæl á stovn.

– Vit hava gjørt eina avtalu um at fáa ein part av felagskassanum, og okkara partur skal ikki minkast, tá onkrir trupulleikar stinga seg upp, sigur Heðin Mortensen, sum í einum nýggjum sáttmála fer at tryggja sær, at føroyska parturin ikki verður broyttur.

# Todi á Old Trafford

**Møguleiki er fyri, at føroyski álopsspælarin verður í FCK álopinum, tá sjøtul sunnudagin verður settur á superliguna**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Todi Jónssn var týskvøldið millum eygnavitnini á Old Trafford. Hann og hinir í FCK hópinum sóu Manchester United hølva franska meistaraliðið Nantes av 5–1. Tað var sjálvandi hugaligt, men Todi Jónsson, sum er avgjørdur Liverpool viðhaldsmaður, heldur á heimasíðuni hjá sær, todi.fo, at tað hevði verið hugaligari, um tað hevði verið Liverpool, sum spældi og vann so nógv!

At Todi og liðfelagarnir eru í Manchester kemst av, at teir so at siga eru flýddir úr Danmark. Fyrsta umfarið í superliguni eftir vetrarsteðgin er á skránni nú sunnudagin. FCK skal spæla á heimavølli í Parkini ímóti AGF.

Tað er rættuliga ivasamt, hvussu tað verður við superliguni sunnudagin. Vetrarveðrið hevur leikað í kring alt Danmark, og tað liggur kavi á flestu vallunum, har landskappingardystir skulu spælast sunnudagin. Men tað verður í hvussu so er roknað við, at tað fer at bera til at spæla í Parkini í Keypmannahavn.

Vetrarveðrið hevur havt við sær, at tað ikki hevur borið til at venja á grasvallum. FCK gjørdi skjótt av, og sunnudagin fóru teir til Manchester. Men har hevur veðrið ikki verið nakað serligt. FCK hevur fleiri ferðir vant á graslíkisvallum. Tað kunnu teir eisini gera í Keypmannahavn.

Undan fráferðini úr Keypmannahavn var upp á tal, at FCK skuldi spæla venjingardyst ímóti Manchester City, sum hevur fyrrverandi FCK mannin, Niclas Jensen, á liðnum. Men venjingardysturin er ikki spældur, og í gjár var tað óvist, um FCK fer at spæla nakran dyst, meðan teir eru í Onglandi.

### Megnar ein tíma

Stóri spurningurin er, um Todi Jónsson nú er nóg væl fyri at spæla týdningarmiklar dystir. FCK venjarin Hans Backe hevur sagt, at hann fegnast um, at Todi nú tykist vera komin fyri seg aftur. Tað, sigur hann, fer at styrkja um álopspartin, men hann heldur ikki, at Todi enn er førur fyri at spæla meiri enn ein góðan tíma.

Todi Jónsson venur við fullari ferð, men hann sigur, at tað framvegis restar eitt sindur í, áðrenn hann verður eins væl fyri, sum hann var undan skaðanum, ið hann hevur drigist við síðani tíðliga síðsta summar.

– Um eg verði á liðnum ímóti AGF sunnudagin, veit eg ikki. Zuma er leikbannaður, og tað átti at økt um møguleikarnar fyri, at eg verði millum teir fyrstu ellivu, sigur Todi Jónsson á heimasíðuni.

Undan fráferðini til Suðurafrika varð Todi Jónsson úttikin til doping roynd. Svarið fekk hann, tá teir komu aftur úr Suðurafrika,og tað segði, at einki er at finnast at.